gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# Vanvirðilig støða

Sjónvarpið hevur við tveimum góðum tíðindabrotum sett fokus á støðuna hjá nøkrum av okkara gomlu: teimum, sum ikki klára seg sjálvi, tí tey eru vorðin dement. Tey kunnu ikki vera einsamøll. Familjan má vera um tey alla tíðina, hjálpin er helst ikki nóg góð, og tey hava ongan tjans at sleppa inn á røktarheim í bræði!

Hetta er støðan hjá nøkrum av teimum gomlu í Føroy-um í dag. Soleiðis virða vit tey, sum løgdu rygg til at byggja upp vælferðarsamfelagið Føroyar: á flakavirkjum, á skipsdekki, við vegarbeiði, á skrivstovum, á sjúkrahúsum ella í heimunum, sjálvari kjarnuni.

Eftir tíðindunum at døma eru gott og væl 275 pláss á ellis- og røktarheimum í Føroyum. Upplýst varð, at tørvurin á røktarheimsplássum er 250. Men tað er neyvan nóg mikið. Fyri nøkrum árum síðani kannaði fyrrverandi kommunulæknin á Skála, Sigvald Kristiansen, málið, og hann kom til ta niðurstøðu, at talið á plássum á ellis- og røktarheimum skal upp í eini 600, um tørvurin skal nøktast.

Bíðilistarnir eru so stórir, at tað er telefonstormur á ellis- og røktarheimunum, tá ein av teimum gomlu er farin hiðani. Tað ljóðar, at leiðslur á ellis- og røktarheimum hava heitt á fólk um ikki at boða frá, at hann ella hon er deyður á ellisheimi, tí tey bera ótta fyri telefonstormi, og at koma í ta ólukkuligu støðu at boða frá, at enn er ikki pláss fyri henni ella honum.

Henda støðan er ikki nýggj, og hetta málið átti óivað at verið raðfest hægri enn tað er. Málið hevur ofta verið frammi, bæði í samband við eldrárið og kanningina hjá Sigvaldi Kristiansen. Men kreppan og vantandi kontinuitetur í almannapolitikinum eru óivað orsøkir til vanvirðiligu støðuna í samband við pláss á ellis- og røktarheimum.

Landsstýrð hevur avgjørt at byggja nýtt heim í Norðurstreymoy, har einki heim er frammanundan. Tí er tað rætt at byggja har, men tá støðan er so ring sum hon er, eigur Almanna- og heilsumálastýrið at gera eina ætlan yvir, hvussu bráðfeingis tørvurin kann nøktast, eins og aðalstýrið eigur at gera eina framtíðarætlan yvir nær og hvar fleiri ellis- og røktarheim skulu byggjast.

Tørvurin er stórur á fleiri útbyggingum: nýggjum landssjúrkrahúsi, ferðaskipi til Suðuroyar, tunnili til Norðoyar og studentaskúla. Bara fyri at nevna nakrar stórar ætlanir úr rúgvuni. Men lítið er at ivast í, at allir flokkar kunnu semjast um, at eldraøkið eigur at raðfestast meiri frammarliga! Verandi støða kann ikki góðtakast, um vit framhaldandi skulu kalla okkum eitt vælferðarsamfelag! Hetta er nakað, sum átti at verið fremst hjá øllum flokkum nú eitt komandi val nærkast. Men tá er eisini greitt, at neyðugu játtaninar mugu finnast til økið.

**Sosialurin**

## VIÐMERKING

# Fáið Teistan í sigling

**Palli Dalsgaard**

Nú er uppá tíðina, at løgtingsmenninir fyri Sandoynna gera nakað við málið um Teistan. Tit kunnu ikki forsvara at blíva sitandi og hyggja at tí oforsvarligu framferð, ið har gongur fyri seg, ella rættari sagt, sum als ikki gongur fyri seg.

Takið og skerið ígjøgnum, latið menninar fáa ta løn, teir krevja, teir hava hana uppiborna.

Tað er nú meðan summar er, teir skulu venja seg at brúka nýggja skipið, so teir kenna tað, tá vetur kemur.

Tað er ikki ovmikið sagt, at tað eru menniskjalagnur, ið standa uppá spæl. Hugsið um umstøðurnar, hasir menninir hava at arbeiða undir, tá tey vánaligu líkindini eru. Har ræður sanniliga um at hava gott fólk innanborða.

Tit báðir hava bukt og báðar endar, um tit vilja brúka tykkara veldi. Tornurosusvøvnurin hevur verið nóg langur um hattar skipið. Tíðin er komin at vakna.

# Ritan er so málmikil

**Finnleif Guttesen**
*Tvøroyri*



**– at tær eru tiltak: tigur ikki heldur enn ritan í berginum. Tosar uttan slit, men hvat kemur burturúr.**

Í blaðgreinini »sum kjógvi eftir ritu« ørkymlast fólkavaldi tjóðveldismaðurin í Suðuroy um eina blaðgrein hjá mær og tað skilji eg væl.

Eg kann ikki lata verað við, at gera nakrar viðmerkingar til greinina hjá hesum fólkavalda tjóðveldismanni í Suðuroy.

- Mær vitandi er Fíggjarmálaráðharrin tjóðveldismaður, hann er so valdur í sessin av Tjóðveldisflokkinum, og tá ið fakfeløg ikki gera sum hann sigur, brúkar hann makt fyri at tvinga sín vilja ígjøgnum.

Hesin tjóðveldismaður er bæði farin í tingið og rættin, hvat er óhoyrt, tí hann ikki megnar at forhandla seg til eina semju við fakfeløg og hetta vísur eisini hvat vit kunnu vanta, um vit ikki gera eftir harraboðum frá samgonguni.

At tjóðveldisflokkurin ikki hevur lagt seg upp í, er so sjón fyri søgn, tosið um virðing og rættindir hjá tjóðveldisformanninum, er sum at hoyra rituna í berginum.

- Skattligu umsitingina av kolvetnisvinnuni hvar fer hon? Jú, Suðuroy fær ein dropa, sum eitur barsilsskipanin, uppskoti til hetta fall á tingi, men nú er onkur rossahandil gjørdur, sum møguliga gevur arbeiði til eitt fólk. Samstundis flytir eitt arbeiðspláss norðurum. Eg meini tað.
- Aldukanningar eru gjørdar á Trongisvágsfirði, men annars hevur kommunan ikki hoyrt eitt orð um nakra nýggja ferjulegu, so hvussu aktuelt tað málið er við verandi samgongu, sum fólkavaldi tjóðveldismaðurin í Suðuroy er partur av, er ivingarsamt.
- At ein Miðnámsskúli blívur bygdur ongantíð ov skjótt, kunnu vit í Suðuroy bert gleðast um, vit hava brúk fyri øllum, sum kann gera umstøðurnar betri fyri okkara ungdóm og lærarar í Suðuroy. Vónandi er hetta ikki bert uttanumtos frá samgonguni.
- At Almanna- og heilsuskúlin bleiv lagdur á Tvøroyri eru vit glað fyri, har var so ein politikari, sum ikki bert segði orðini, men eisini tók eina politiska avgerð. Men tá ið tað er sagt, so skal eisini viðmerkjast, at Tvøroyrar kommuna hevur goldið stóra upphædd fyri at fáa skúlan upp at standa, og higartil er ikki eitt klovið oyra komið frá landsstýrinum.
- Tosið um nýggja ferju og berghol, er tað sum ritan í berginum, bert tos uttan slit frá samgonguni?

## Atgongumerkjasølan byrjar í dag

Kunningarstovan í Havn og Norðurlandahúsið í Føroyum byrja í dag, hósdagin 21. juni, at selja atgongumerkini til Jezzfestivalin í ár. Hann verður hildin í døgunum 3. til 8. juli.

Ongantíð fyrr hevur verið møguligt at keypa atgongumerki til so nógvar ymiskar konsertir og tónleikatiltøk, sum hesuferð. Tórshavnar Jazz- Fólka- og Blues Festivalur hevur fyri tað mesta verið hildin í Norðurlandahúsinum. Men í ár ger hann innrás í Tórshavnar bý. Norðurlandahúsið verður tó høvuðskarmur um eitt av kvøldunum.

Uttanfyri Havnina er skipað fyri einari framførslu á Hotel Vágum og tveimum í Klæmintsgjógv í Hesti.

Gamla Meiarí, Norðurlandahúsið, PLATFORM, Sjónleikarhúsið, Kirkjurnar, Listaskálin, Festival Klubbin, FK í Hoyvík, Gongugøtan, og Hotel Hafnia. Tað eru støðini, har tað mesta fer at henda. Og so kanst tú vála ímillum spælistøðini og njóta tónleikin og góða lagið.

Tónleikaliga er útboðið stórt. Tú kanst velja alt frá suðuramerikonskum rútmum, til harðan rokk. T.d. spælir Niels Henning Ørsted-Pedersen á sín heimskenda kontrabass. Eivør Pálsdóttir syngur í tí best kenda føroyska rokkbólkinum, Clickhaze. Fleiri Big Bands spæla. Teenagesangarin Brandur Enni fer at vísa okkum, hvussu stórt talent hann er. Og vit kunnu eisini nevna, at fleiri gospelkonsertir verða á Tórshavnar Jazz- Fólka- og Blues Festivali 2001.

Kunningarstovan og Norðurlandahúsið selja atgongumerkir til Sjónleikarhúsið, Gamla Meiarí, Norðurlandahúsið, og PLATFORM hósdag. Í PLATFORM kosta atgongumerkini 30,- kr. til tiltøkini fríggjakvøld og leygarkvøld millum klokkan 22.00 og midnátt.

Hinar konsertirnar eru ókeypis.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

gult9 cyan9 magenta9 svart9



## VIÐMERKINGAR

# Demokrati og frælsi – ikki í tjóðri – men undir ábyrgd

**Jógvan við Keldu,**
*tingmaður Fólkafloksins:*



Nei, Hans Pauli Strøm, eingin ivi er um, at »dómarin« ella fólkið hevur sæð hetta frísparkið við hesi óvirðiligu og primitivu»tackling«.

Hans Pauli Strøm javnaðartingmaður, hevði í Sosialinum seinasta leygardag og í Dimmalætting týsdagin viðmerkingar til grein hjá mær í Dimmalætting undir heitinum »Vestmanna skúli, løgreglan og Javnaðarflokkurin«. Eg vísti á ábyrgdarleysan flokk, ein lóggevandi part, ið mótmælti virksemi løgreglunnar, tá hesir fyrimyndarliga virkaðu fyri lóg og landaskili. Greinin vísti annars á bakbit frá Vestmanna skúla í almennum fjølmiðlum á politiska myndugleikan, tí »ov lítil« peningur varð játtaður.

Onkur hevur sagt, at, »hjá politiskari andstøðu ræður um at leggja fót fyri stjórnina soleiðis, at veljarin sum dómari ikki leggur til merkis frísparkið«.

Eingin ivi er um, at Hans Pauli Strøm í svari sínum her veruliga er á tunnum ísi, og Javnaðar-flokkurin í hesum føri er gingin ov langt. – Tað heldur føroyingurin vanliga eisini.

Tað er næsadjarvt – við fullum seglum – at fara út og billa fólki inn, at Javnaðarflokkurin er meira demokratiskur og frælsur enn Fólkaflokkurin, at javnaðarfólk hugsa meira demokratiskt enn fólkafloksfólk. – Hvat er hetta fyri hugsunarháttur, og út frá hvørjum grundarlagi verður hetta sagt.

### »Tale er sølv... Tavshed er underkastelse«

Frælsi og demokrati eru dýrt vunnin rættindi, men vit eiga minnast til, at tílík rættindi eiga at varðveitast bæði við viti og vísdómi, tí grundleggjandi er, at tey eru undir ábyrgd.

Vestmanna skúli hevur ikki bert rætt men skyldu til at úttala seg við sínar samstarvsfelagar, men at bakbíta politiska valdið í almennu fjølmiðlunum, tá er gingið ov langt. - Hetta hevur einki við frælsi og demokrati at gera.

Eg skal ikki døma um metingina hjá javnaðartingmanninum av privatum vinnulívi, sum eg var í í 21 ár, men eg las áhugaverda bók sum Knud Tholstrup, stjóri á Kosan-fyritøkuni skrivaði, har hann hevur áhugavert tema um frælsi og demokrati – hann var eisini limur av fólkatinginum í Rets-forbundet . Út frá heitinum: »Tale er sølv...tavshed er underkastelse«, viðger hesin megnar vinnu-lívsmaður, sum mangir føroyingar kenna, hava siglt við og rósa, hvussu virðismikið demokratiið og frælsi er undir ábyrgd, og hvat frælsi veruliga er.

Frælsið er ikki skapt til krígsførslu, men til at tosa saman. Frælsi og demokrati er heldur ikki skapt til at »kroysta og aftur kroysta« pening frá skattgjaldaranum til sín sjálvs, og gerst hetta ikki, so kann almenni fjølmiðilin brúkast. – Hetta er álvarsliga misskilt frælsi og ein ræðandi tendensur í tíðini, at einstaklingar halda seg hava rætt til at sleppa framat til at broyta viðurskifti á hægsta stað – ofta tíanverri eggjaðir av almennu fjølmiðlunum.

Parlamentariskt demokrati er tvørturímóti grundað á rættin hjá tí einstaka at greiða atkvøðu.

### Leggur mær onnur orð í munnin

Javnaðartingmaðurin skjýtur mær í skógvarnar, tá eg tosi um at »tað eigur at fáa avleiðingar«, at eg við hesum sigi, at »so eigur hon at fáa sekkin«. Hetta er at leggja mær orð, eg ikki havi sagt, í munnin, tí avleiðingar eg hugsi um her eru, at tílík fólk eiga at fáa eina ”alvorliga” rættleiðing og átalu, um nakað skil skal vera á stovnum okkara og á samfelagnum.

Eisini tá hann sigur, at: »Onki veit Jógvan um hennara politisku hugsanir – men fyri hann er nóg mikið at vita, hvørjum hon er gift við!« og leggur hann síðani afturat: »Guð formbarmi seg«.

Ikki við einum orði er nevnt, hvørjum hon var gift við, men eg segði: »...hóast eg ikki visti hvør hetta umboðið var, og hvønn hon hoyrdi til«. – Tað skuldi ikki serliga »musikalskt« oyra til at gera sær eina mynd av politiska álopinum. –Allar flestu føroyingar duga at lesa »millum linjurnar«.

Í grein míni í Dimmalætting gjørdi eg vart við primitiva og óvirðiliga álopið frá lóggevandi Javnaðarflokkinum bæði í samband við Vestmanna skúla og álopið á løgregluna.

### Heldur Jóannes Ejdesgaard enn Hans Pauli Strøm

At ein seriøsur og rættur løgtingsmaður - sum afturat er samfelagsfrøðingur - mótmælir grein míni, og heldur demokratiska legan í einum javnaðarfólki liggur hægri enn hjá einum fólkafloks-fólki, undrar meg ikki so lítið. Hinvegin var tað leiðari floksins Jóannes Ejdesgaard, hevði eg ikki hugsa so nógv um tað.

Áðrenn eg gevist, fari eg at vísa á stríðið í Gøteborg, har partamaður Hans Paula Strøm, Gøran Person, var illa heitin í samband við ES-fundin og vitjanina hjá USA forseta George W. Bush, har ófriðakroppar oyðiløgdu fyri einar 100 milliónir krónur og kendust vandamiklir.

Her var sanniliga »frælsi« fyri allar pengarnar.

Nei, Hans Pauli Strøm, eingin ivi er um, at »dómarin« - ella føroyska fólkið - hevur sæð hetta frísparkið við hesi óvirðiligu og primitivu »tackling«.

# Pellar Høgni Hoydal?

**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*



Seinasta útrokning hjá varaløgmanni vísir at honum bert tørvar 4 % av ríkisveitingini!

Er Høgni Hoydal ein rokniúrnælingur framum flestu aðrar - ella sigur hann ósatt?

Í beinleiðis ríkisveiting fáa Føroyar knappa milliard. 4% av einari milliard eru 40 milliónir ella ein góð hálv sandoyarferja - ið tíverri ikki er komin í sigling enn.

Um Hoydal á pappírinum strikaði alla (beinleiðis) ríkisveitingina, ið er umleið 1000 milliónir krónur - ja so hevði hann tørv á knøppum 40 milliónum krónum. Fyri mær og mongum føroyingum er roknikynstrið hjá Pf H Hoydal & Co so langt úti, at tað greitt yvirhálar allan 80 - ara politikk samanlagdan. Og úrslitið verður hareftir.

Eftir míni hugsan áttu føroyingar at kravt óheftar búskaparligar kanningar (møguliga útlendskar) av roknistykkinum hjá Pf Hoydal & Co, tí aftur hesaferð er vandi fyri at hesin 80 roknih※áttur, fer á húsagang. Og tað má ikki henda. Tí rokningin fyri fallitið hevur hann bert eitt stað at senda, nevniliga til føroya fólk.

Heilsuverkið, skúlin, almannaverkið, og føroyingar tola ikki fleiri politiskar kleyvarskapsrokningar.

Føroyingar tola ikki nakað politiskt 80 ara loysingar eksperiment í mega klassa, við 50000 føroyskum lagnum sum statistum. Har 1000 milliónir bert eru 40 milliónir.

Tí tað er so sera lætt at fáa roknistykkið at ganga upp, tá 1000 milliónir við einum pennastroki bert gerast til 40 milliónir. Tá ber mangt til á pappíri, ið ikki ber til í veruleikanum.

Roknirtykkið Høgna Hoydals vísir greitt, at hann er óseriøsur í sínum máta at viðgera álvarslig fíggjarlig viðurskiftir. Hví loysir hann ikki ídag um bert 40 milliónir tørva?

Eg haldi at Høgni Hoydal pellar - orsaka meg.

# Ræðandi avdúkingar !

**Trygvi F. Guttesen**



Sum eitt larmandi omanlop kemur nú alt oftari fram hvussu vandamikil Tjóðveldisflokkurin er.

Á landsfundi Sambandsfloksins var víst á, hvussu lítið skil er á fullveldisætlan Tjóðveldisfloksins. Við tølum úr Hvítubók vórðu dømi um gjaldføri landskassans og fíggjarorku búskapargrunsins framvíst.

Sambandsflokkurin hevur síðani í bløðunum og á fundum kring landið greitt frá, hvussu vandamikil ætlan Tjóðveldisfloksins er. Men formaður Tjóðveldisfloksins roynir við uttanumtosi og við gandandi demagogikki at afturvísa allar ávaringar frá andstøðuni.

Upp í saman verður endurtikið, at blokkurin er bert 4% av føroyska búskapinum, og tí er eingin vandi í at loysa her og nú. Men Hvítabók (sum einaferð skuldi siga allan sannleikan um føroyskt fullveldi) sigur, at rætta talið er umleið 50%. Og kortini sigur Høgni Hoydal, at Hvítabók er sera álítandi.

Um bókin er so álítandi, hví trýr hann so ikki tí, sum stendur í henni?

### Trúgva ikki sær sjálvum

Síðani siga teir, at 600 mió. krónur leypa av árliga, og verða settar á bók. Men hann hjálpi okkum, nú vilja teir samráðast um at minka blokkin við 356 mió. krónum.

- Hví biðja teir ikki um at blokkurin verður minkaður við hasum 600 milliónunum, so javnvág kann koma í roknskapin?
- Hví skal eitt fullveldislandsstýri taka ímóti pengi, sum teir siga seg ikki hava brúk fyri?
- Hví má landsstýrið hava 15 ára skiftistíð, fyri at avvikla tað, sum teir siga vera 4% av búskapinum?
- Hví eru 4 ár ikki nóg mikið?
- 4% í 4 ár, er tað ikki 1% um árið?
- Hvat er tað fyri eitt fiskivinnusamfelag, sum skal standa á egnum beinum, men ikki tolir eina skerjing uppá 1% um árið?

### Rokniark

Nú hevur Javnaðarflokkurin eisini gjørt somu kanning sum Sambandsflokkurin og eyðsýnt er, at teir koma júst til somu niðurstøðu, nevniliga at púrt einki høpi er í tølunum hjá Tjóðveldisflokkinum og tess leiðslu. Men svarið til Javnaðarflokkin er tað sama, sum Sambandsflokkurin fekk: “Tit brúka bert eitt rokniark, og tað gevur eina skeiva mynd”.

So langt hevur Tjóðveldisflokkurin fingið sínar tilhangarar at fara, at sjálvt búskaparfrøðingar við tilknýti til flokkin hava hesa seinastu tíðina verið í fjølmiðlunum og tileinkisgjørt búskaparfrøðina til frama fyri fullveldið.

### Uttanumtos

Seinasta avdúkingin sum Signar á Brúnni skrivaði um, og aftursvarið hjá Høgna Hoydal vísir enn einaferð, hvat rørir seg í Tjóðveldisflokkinum.

Signar skrivar um givin lyftir, men Høgni svarar við at skrivar um hvat flokkurin hevur viðgjørt og samtykt, og kemur til ta niðurstøðu, at eingi lyfti eru givin.

Eftir situr lesarin og veit, at annaðhvørt er tað Høgni ella Signar, sum sigur ósatt.